einfaldari
- ger tað einfaldari
Januar 2013

# SØGULIGUR DAGUR



*Unn Zachariassen og Beinta Áargarð innsettar sum elstar í Lívdini*
*Mynd: Tórvør Vang*

Sunnudagurin 2. desember 2012 var søguligur í føroyskari samkomusøgu. Hetta var fyrstu ferð kvinnur vórðu settar í samkomuleiðslu innan brøðrasamkomurnar í Føroyum. Hetta hendi í Lívdini í Hoyvík, sum so mangan gongur fremst og fyrimyndarliga peikar á tað lív og tað frælsi, sum tey endurloystu eiga í Kristusi. Jógvan Zachariassen, pastor í Lívdini, segði, “Eg eri keddur av, at vit ikki fyri langari tíð síðani tóku stigið at seta kvinnur inn í samkomuleiðsluna, men eg var ikki sannførdur út frá skriftunum. Men tað eri eg í dag! Ja, sanniliga eri eg tað í dag!! Og eg ynski at brúka restina av lívi mínum at peika endurloystum monnum og kvinnum á, at vit eru sett at røkta og leiða Guds samkomu og verk uttan mannamun og uttan kynsrollur, tó á okkara egna gudgivna hátt – so ymisk sum vit eru sum maður og sum kvinna. Tað er mín dreymur, at døtur og synir okkara, ommu- og abbadøtur og -synir okkara skulu síggja hetta fyrimyndarliga útynt í verki, sum tey vaksa upp í samkomuni."

## Nýggjárslyfti og nýggjársynski

Vit eru óiva fleiri, sum hava gjørt okkara egnu nýggjárslyfti, men her eru míni nýggjársynski fyri okkum øll:

**Verð reinur.** Gud brúkar mong ymisk íløt, men Hann brúkar ikki órein íløt.

**Reinsa út** úr tínum lívi tað, sum tú veitst voldir Heilaga Andanum sorg. Játta tilvitaða synd fyri Gudi og tak ímóti fyrigeving og reinsan Hansara.

**Kom í form.** Um tú skalt gera alt, sum Gud ynskir at gera gjøgnum teg í ár, so hevur tú brúk fyri orku – nógvari orku. Ansa eftir vektini. Et væl. Ven. Sov nóg nógv. Vit hava øll brúk fyri tí.

**Fokusera.** Síðuspor – sjálvt tey, sum eru góð og spennandi – fara, meiri enn nakað annað, at halda teg frá Guds bestu ætlanum fyri teg og samkomu tína.

**Hav trúgv.** At liva í vantrúgv er synd. Um tú ynskir at hava eina stóra visión, so verður hon av ongum uttan trúgv og álit á ein stóran Gud.



**Kom í gongd.** Ger tað, sum tú veitst Gud hevur kallað teg til. Byrja í dag!

Bøn mín er, at 2013 fer at verða títt besta ár higartil í lívinum! Vit hava brúk fyri tær. Heimurin hevur brúk fyri tær. Og Gud ynskir at brúka teg!

Gott nýggjár!

*Jógvan Zachariassen*

# Hendingar & tiltøk

## Jóhanna og Jógvan í IKTUS




Í januar heldur IKTUS fram at senda røðina: Ger trúgvin mun? Jóhanna Andreasen og Jógvan Zachariassen tala. Røðin er upptikin í Lívdini í oktober og november.
IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni. Sí skránna og les meira á www.iktus.fo ella Facebook/Iktus

## Dópur í samkomuni




Mánakvøldið 10. desember skipaði Lívdin fyri dópi í samkomusalinum Hebron á Argjum. Tey, sum lótu seg doypa, vóru: Jákup Lind Dam, Karita Maria Zachariassen, Johanna Brimsvík, Boas Heinesen, Ásdis Hansen, Jónvør Danielsen og Símun Arge.

## Lívdin á Facebook

Lívdin hevur sín egna profil á Facebook, sum er: www.facebook.com/Livdin. Har verða upplýsingar um aktivitetir o.a. regluliga lagdir út.

## Bók um brøðrarørsluna í Føroyum



*Myndatekstur: Tórður Jóansson*
*Mynd: Fróðskapur*

Sunnudagin 16. desember 2012 var almenn framløga í Læraraskúlahøllini av bók hjá Tórði Jóansson um brøðrarørsluna í Føroyum.
Fróðskapur gevur út bókina ”Brethren in the Faroes. An Evangelical movement, its remarkable growth and lasting impact in a remote island community”. Talan er um ph.d.ritgerð, sum Tórður vardi við University of Glasgow fyrr í 2012.
Í ritgerðini hevur hann viðgjørt brøðrarørsluna í Føroyum, søguna, menningina og ávirkanina, sum hon hevur havt og hevur á føroyska samfelagið.

## Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

## Altjóða leiðarastevnan



Á altjóða leiðarastevnuni The Global Leadership Summit, sum verður í Norðurlandahúsinum dagarnar 11. og 12. januar 2013, verða níggju ymiskir fyrilestrahaldarar, har ímillum fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Condoleezza Rice og Njál Djurhuus, offiserur í Frelsunarherinum. Rástevnuleiðari verður Jógvan Zachariassen. Les meira á www.gls.fo

## Bønarløtur í Lonini




Týskvøld kl. 20.00 eru bønarløtur í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

**Skráin fyri týskvøldini januar 2013**

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 8. januar | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 15. januar | Bønarløta |
| Týskvøldið 22. januar | Bønarløta |
| Týskvøldið 29. januar | Kyknubólkar |

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 6. januar

Familjumøti kl. 10.30: Vitnisburður v/ Hervør Knudsen úr Porkeri

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Nýtt ár – spennandi avbjóðingar
Leiðslan skipar fyri

## Sunnudagin 13. januar

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Galatarabrævið
Talari: Jógvan Zachariassen

## Sunnudagin 20. januar

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Galatarabrævið
Talari: Jógvan Zachariassen

## Sunnudagin 27. januar

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Galatarabrævið
Talari: Jógvan Zachariassen

## Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00




** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*